Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingskvinna

Svarari: Djóni N. Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Týðing til føroyskt innan útbúgvingarøkið

Spurningar:
1) Hvussu nógv tilfar verður týtt til føroyskt um árið innan økið hjá landsstýrismanninum? Metir landsstýrismaðurin, at tað er nóg mikið?
2) Hvør týðir tilfar til føroyskt, og hvat slag av tilfari týða tey?
3) Hvussu nógv fíggjarorka verður tilsamans nýtt til at fáa til vegar týtt tilfar árliga á økinum hjá landsstýrismanninum?
4) Verður arbeitt við at menna eina útbúgving í týðing á Fróðskaparsetri Føroya?

Viðmerkingar:
Sambært granskarum innan økið, so er týðing eitt alneyðugt íkast í arbeiðinum hjá smærri málsamfeløgum at tryggja sær nóg mikið av dygdargóðum og áhugaverdum lesitilfari, undirvísingartilfari og øðrum tilfari, á tí máli, sum verður tosað í teimum samfeløgunum.

Í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina fyri 2025 varð umrøtt, hvussu nógv fíggjarorka mundi vera nýtt til týðing til føroyskt mál tilsamans. Tað var ikki heilt greitt, og ivi er um, hvussu nógvir ymiskir partar lyfta uppgávuna at týða til føroyskt, hvussu tað verður lagt í ætlan, hvussu tað verður fíggjað og stimbrað á ymsan hátt. Og ein viðkomandi spurningur er kanska, um nóg mikið verður týtt, og um alt tað mest viðkomandi verður týtt.

Í sambandi við arbeiðið hjá FarLit, so hevur fleiri ferðir verið at hoyrt, at ein íløga í at fáa føroyskar bókmentir út í heim hevði verið ein týðaraútbúgving á Føroyamálsdeildini, har málfólk við øðrum tungumálum, sum hava áhuga í at arbeiða við týðing, kundu lært føroyskt og kundu nomið sær førleikar at týða. Um slík útbúgving var til, so kundu eisini lesandi við føroyskum sum móðurmáli og við áhuga fyri og møguliga kunnleika til onnur tungumál eins og áhuga fyri týðing, tikið slíka útbúgving við tí fyri eyga at týða t.d. útbúgvingartilfar úr øðrum málum til føroyskt.

Av tí at føroyskt mál er undir trýsti er harvið útbúgving og alt samfelagið á føroyskum undir trýsti, og tí er helst neyðugt at arbeiða á fleiri mótum samstundis fyri at styrkja støðuna hjá føroyskum sum samfelagsbærum máli og sum málið, alt fólkið, sum býr í Føroyum, nýtir hvønn dag og í øllum lívsins viðurskiftum.

Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 23. apríl 2025

Hanna Jensen